# Bið um atkvøðuseðilin!



**ANDRASS SKAALUM**
Tórshavn, valevni til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna

Komandi tvær vikurnar verður val til umboðsráði fyri Ognarfelagið Tryggingartakaranna.

Eg eri valevni og havi áhuga at verða við í Umboðsráðinum fyri Ognarfelagið Tryggingartakaranna og at arbeiða við uppgávum har, til frama fyri teg sum tryggingartakara, fyri felagið og samfelag okkara.

Niðanfyri er í stuttum nøkur av málum, eg vil virka fyri:

- Betri gjøgnumskygni so tryggingartakarin fær innlit og kann fylgja við.
- At vit vísa virðing - fyri fakinum, tryggingartakaranum og starvsfólkunum.
- At kapping framhaldandi er á tryggingarmarknaðinum.
- At vit javnan máta og dagføra dugnaskap okkara í mun til bestu aktørarnar á marknaðinum (Benchmarking).
- At smærri íleggjarar fáa arbeiðsfrið og ognarfelagið arbeiðir har aðrir ikki røkka.
- At virksemið í mesta mun kemur føroyska samfelagnum tilgóðar.
- At umsita ognir við dugnaskapi og virðing fyri tryggingartakarunum.

Tað vildi glett meg at fingið høvið at umboða teg og fingið tína atkvøðu til Umboðsráðið, at arbeiða við hesum málum í samtakinum.

Sí talvu

Tey, sum hava onkra trygging hjá "Tryggingarfelagið Føroyar" pr. 01. januar í ár, hava rætt at atkvøða.

Tryggingar kunna vera bilur og onnur akfør, hús, innbúgv, bát, neyst, ferðatrygging, vanlukkutrygging, familjutrygging, hjálparfólkatrygging og annars ymsar aðrar vinnutryggingar.

Atkvøðuseðilin kemur ikki av sær sjálvum, tú skal biðja um at fáa hann sendandi, fyri at tú kann atkvøða.

»Sjáldan fast tað í lag, ið kemur í drag«, tí er umráðandi at fáa hetta avgreitt beinan vegin.

Eg vil við hesum biðja um tín stuðul til Umboðsráðsvalið J.




# Vestergaard er ein vanlukka

**Verandi kreppustøðan hjá føroysku fiskivinnuni eru beinleiðis úrslit av cowboy-biologisku filosofi'ini hjá Fólkaflokkinum, sigur Torbjørn Jacobsen**

POLITIKKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin*

Fyrrverandi fiskimálaráðharrin segði, tá hann tók við, at nú skuldi lívfrøðin í nógv størri mun stýra fiskiskapinum. Og Torbjørn Jacobsen er ikki í iva, tá hann skal viðmerkja útsøgnina hjá Jacob Vestergaard, sum heldur fiskifrøðina stýra Føroyar móti avgrundini.

– Fiskivinnan er sjálvt fundamentið undir okkara búskapi, og tí er landsstýrissessurin í fiskivinnumálum nógv tann týdningarmesti av øllum. Í fleiri ár hava vit onga politiska stýring havt av fiskivinnuni, og tí heldur onga búskaparstýring. Og hava vit ein somikið ignorantan fiskimálaráðharra, at hann hevur sagt hasi orðini, so er hann ein vanlukka. Ikki bara fyri føroyska fiskivinnu, men fyri tann samlaða føroyska búskapin, sigur Torbjørn Jacobsen.

– Síðani 2002 er toskaveiðan minkað úr 38.000 tonsum niður í 10.000, og hýsan er minkað úr 24.000 niður í 5.00 tons. Hetta svara til eitt avreiðingarvirði á 600 milliónir, og frá virkiseigarum, sum eg havi spurt, verður sagt, at talan erum eitt eitt útflutningsvirði upp millum 1 og 1,2 milliardir krónur.

– Og hetta er beinleiðis úrslit av politisku kósini, har Jón Kristiansson hevur verið tann heilt stóra guru'in. Og eg fati ikki, at tann politiska skipanin áhaldandi letur Fólkaflokkin gera av við føroyska fiskivinnu.

– Ikki minst tí at lagaliga løtan er júst nú. Vit hava í dag einar 18.000 óvirknar dagar í skipanini. Trupulleikin er, at nú náttúran aftur hevur verið við eina tíð, og nógvur smáfiskur helst er væntandi, verður hendan deyðvekt, sum í berari armóð hevur verið óvirkin, aktiverað. Og tí verður fiskurin uppfiskaður alt ov tíðliga.

Spurdur, hvørji ráð eru at taka, sigur Torbjørn Jacobsen, at lívfrøðin er einasta alternativið, sum vit hava, og tí má hetta fylgjast.

– Veruleikin er, at vit í dag sita við eini manko upp á umleið 30.000 tons í feskfiski í mun til meðalveiðuna seinastu 100 árini. Við at halda fast um verandi kós, sum als ikki er nøkur kós, men ein kreppustýrd vinna, stýra vit beint til næstu kreppu.

– Stálið og ognarviðurskiftini í flotanum hava alt ov leingi verið tað, sum hevur stýrt politikkinum. Tá stovnurin er tað veikasta liðið, so mugu vit taka støði í hesum. Tað er eins og við einum banka. Tekur tú meira enn rentuna út, so minkar fæið, og tað er tað, sum alt ov leingi er hent hjá okkum, sigur Torbjørn Jacobsen.

# Jan Danielsen stjóri í Heilsutrygd



Jan Danielsen er settur í starv sum stjóri í nýstovnaða almenna stovninum, Heilsutrygd í Klaksvík.

Jan Danielsen er 43 ára gamal og hevur m.a. útbúgving innan HD í roknskapi. Hann hevur drúgvar royndir innan leiðslu og fíggjarstýring í fleiri fyritøkum umframt at hava røkt álitisstørv í nevndum. Jan Danielsen byrjar í starvinum 1. mars 2010.

# Sandoyggin



**BRANDUR SANDOY**

Tá nú í kvøld bórust tíðindi um, at Mentanarnevnd Løgtingsins, sambært formanninum Magna Laksáfoss, hevur ásannað, at ítróttarhøllin, sum ætlanin er at byggja við felagsskúlan inni í Dal á Sandoynni, ikki samsvarar við ta privatu byggiætlan, ið væntandi verður veruleiki í Skálavík, kann ikki sigast annað enn, at vit á Sandoynni anda lættari. Tað hevði verið eitt mistak at samantvinna hesar verkætlanir, tí næstan alt sum oyggin er felags um, liggur við skúlan Inni í Dal.

Vit sum hava okkara dagligu gongd í Sandoynni standa mangan spyrjandi, tá man frá okkara fólkavaldu hoyrir útsagnir um viðurskifti, sum nema okkara hjartastreingir. Í hesum førinum við ítróttarhøllini, var tað so aftur Magni Laksafoss, sum eftir okkara tykki eisini setti kílar í Sandoyartunnilin á sinni. Útsagnirnar tá vóru, at Sandoyartunnilin skuldi útsetast til tíðirnar versnaðu. Nú eru tíðirnar versnaðar, men enn standa vit á Skopunarkei og bíða eftir ferjuni, og ongin er enn farin í holt við at bora.

Magni er stak fornuftigur maður. Hann hevur funnið útav, hvussu hann kann tekkjast nøkrum veljarum, og tí fer hann systematiskt eftir at gera teimum til vildar, sum halda, at Sandoyggin skuldi verið strikað av Føroyakortinum. Eg havi enn tilgóðar at hoyra henda fólkavalda tosa gott um Sandoynna. Alt gott um Magna; dámi væl hansara fíggjarpolitisku hugsjónir.

Nú umleið 10 ár eru farin, síðani vit byrjaðu at tosa um undirsjóvartunnil til Sandoynna, kunnu vit spyrja okkum sjálvi, hvussu nógv nærri vit eru komin eini loysn á hesum máli. Svarið má vera, at vit als ikki hava flutt okkum úr stað. Nógv varð tosað, og nógv varð lovað fyri 10 árum síðani, men hvat er veruliga hent. Onki, als onki. Enn verður nógv tosað, men tosið er fyri tey sum búgva á Sandoynni vent til frustratiónir, av tí at man ikki sær nakað úrslit, og fyri tey sum ikki búgva á Sandoynni, er Sandoyggin og tað afturvendandi tosið um tunnil, vorðin ein pestilens, grátur og tannagrísl um henda vælsignaða sandoyartunnilin, sum vit jú ikki hava ráð til, og um henda veruleikan, sum hesi ólukku fólkini á Sandoynni ikki duga at síggja í eyguni.

Samanumtøkan, ið vit á Sandoynni mugu til at síggja í eyguni er, at tað krevur meiri av okkum, sum vilja búleikast í Sandoynni, enn tað nakrantíð hevur gjørt. Tað, at vilja offra nakað, og at geva avkall upp á møguleikar, sum aðrir borgarar í landinum hava, er í dag ein veruleiki fyri okkum, sum búgva á Sandoynni. Við at búgva á Sandoynni má tú ásanna, at tú hevur ikki, og fyribils kemur tú heldur ikki at hava, somu møguleikar, sum onnur nærri miðøkinum hava. Hetta er ein veruleiki, og vit mugu bara liva við honum, so leingi sum vit ikki hava politikkarar, sum hava hegni og dugnaskap at vinna okkum sømdir landspolitiskt. Jú fyrr vit innsíggja henda veruleika, jú fyrr kunnu vit taka støðu, um vit veruliga vilja offra tað sum krevst, fyri at búgva á Sandoynni.

Tá hetta er sagt, skal leggjast afturat, at tey, sum veruliga vilja geva nakað fyri at búgva á Sandoynni, tey fáa aðrar ágóðar afturfyri. Ágóðar, ið tey sum búgva nærri miðøkinum droyma um hvønn dag. Møguleikar, ið tey sum eru nærri miðøkinum leingjast eftir dagliga, eins og vit sum búgva í Sandoynni leingjast eftir teimum møguleikum, sum miðstaðarøkið hevur at bjóða.

Ung fólk, sum hava útbúgvingar, hava sera ilt við at finna aftur til Sandoynna. Hetta er ein heilt náttúrlig gongd, tí á Sandoynni eru ongir stovnar lagdir, og ongi arbeiðspláss, sum krevja væl útbúgvin fólk, hóast vit ikki hava havt sørt av landstýrismonnum, sum vit jú síggja hava tað avgerandi orðið, tá um staðseting av stovnum umræður. Hví so ikki er, ja vit standa spyrjandi?

Samanumtikið kann sigast, at umboðan okkara á tingi og í landsstýri kundi havt fingið meiri burturúr, og tað er bara at vóna, at umboðanin verður betri næsta tingskeið.